

## Sarkozy krevur úrslit

Franski forsetin, Nicolas Sarkozy, krevur, at toppfundurin hjá G20-londunum skal koma til eina veruliga niðurstøðu, sum munar. Hann hevur gjørt greitt, at hann tekur ikki undir við tí niðurstøðuuppskotinum, sum nú liggur á borðinum í London. Við útvarpsstøðina Europe 1 sigur Sarkozy, at Frakland og Týskland kunnu taka undir við tí, sum higartil er komið á pappírið. Tey bæði londini krevja betri eftirlit við grunnum og kreditfeløgum, og at øll skattaskjól verða beind burtur. Sambært fronskum fjølmiðlum skal forsetin vera so misnøgdur, at hann hevur hótt við at rýma av toppfundinum, fær Frakland ikki stuðul har.

## 900 søktu móttøkustarv

Danskir arbeiðsgevarar, almennir og privatir, fáa heilt óvanliga nógvar umsóknir, tá teir lýsa eitt ella annað starv leyst. Áhugin fyri størvunum hjá tí almenna er vaksin serliga nógv, soleiðis at umsóknirnar eru fleirfaldaðar tað seinasta hálvárið, sigur DR. Tað sást millum annað, tá Orkumálaráðið lýsti eftir skrivstovufólki herfyri. Fyrr hevði eitt tílíkt starv fingið einar 50 umsóknir, men hesaferð komu 550. Tað stóð heldur ikki á hjá Arbeiðseftirlitinum, tá tað herfyri søkti eftir fólki til móttøkuna. Tá umsóknarfresintin var úti, hevði eftirlitið fingið 901 umsóknir.

# Fólkaflokkurin slítur ikki samgonguna í morgin

**Tá ið nevndarvalið verður í Atlantsflogi í annaðkvøld kann Johan Dahl ótarnaður halda fast við sítt um at tað almenna skal hava eina nevndarlim afturat. Vit hava ongantíð gjørt hetta til ein spurning um at slíta samgonguna ella ikki, sigur Jákup Mikkelsen, formaður Fólkafloksins á tingi**

NEVNDARVAL Í ATLANTSFLOGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hóast Johan Dahl heldur fast við sítt um at velja ein nevndarlim afturat í Atlantsflogi, fer tað ikki at kota samgonguni lívið, staðfestir Jákup Mikkelsen, formaður Fòlkafloksins á tingi*

Ósemjan í samgonguni um nevndarbýtið í Atlantsflogi fær ongar avleiðingar fyri samgonguna.

Tað ger Jákup Mikkelsen, formaður Fólkafloksins á tingi, greitt fyri Sosialinum í morgun.

Tað førdi annars til rok í samgonguni, tá ið Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, boðaði frá, at hann ætlaði at tað almenna skal hava ein nevndarlim afturat í Atlantsflogi fyri at nevndarbýtið skal geva eina rætta mynd av ognarviðurskiftunum í felagnum, har tað almenna eigur tveir triðingar og privatir partaeigarar eiga ein triðing.

Hetta tóku teir privatu partaeigararnir óluksáliga illa upp, tí teir hava ført fram, at hetta er beint ímóti einum lyfti teir fingu frá landsstýrinum, tá ið teir keyptu partabrøvini.

Fólkaflokkurin í samgonguni legði eisini hart út og hevur kravt, at Johan Dahl gekk frá hesi ætlan, tí hetta var ein spurningur um álit og tað var heilt avgerandi fyri Fólkaflokkin.

### Ikki eitt samgongumál

Síðani hava fundir verið í samgonguni, men tað hevur ikki verið heilt greitt, hvat úrslitið var. Fyrst varð boðað frá, at semja var millum partarnar. Men skjótt fekk pípan eitt annað ljóð, tí so bleiv tað til, at partarnir skiltu hvønn annan.

Seinni er tað so blivið greitt, at ongin semja hevur verið um nevndarbýtið í Atlantsflogi.

Og Jákup Mikkelsen, sum er formaður fyri Fólkaflokkinum á tingi, ger púra greitt fyri Sosialinum, at Fólkaflokkurin hevur ongantíð ætlað at gera hetta til eitt samgongumál.

- Vit ganga út frá, at Johan Dahl og privatu partaeigararnir finna eina semju sigur hann.

Men skuldi tað miseydnast, fær tað ongar avleiðingar fyri samgonguna.

- Vit hava ongar ætlanir um at slíta samgonguna, sigur Jákup Mikkelsen

Hann leggur afturat, at eitt slíkt mál er ikki ein spurningur um at slíta samgonguna ella ikki.

- Vit hava ongantíð sett samgonguna upp á spæl í hesum máli og tað fara vit heldur ikki at gera, leggur hann afturat.

Úrslitið av samráðingunum í samgonguni hava verið, at nú skulu leiðreglur gerast fyri, hvussu tað almenna skal bera seg at í teimum partafelagnum, sum tað almenna eigur í og hvussu nevndir skulu veljast í teimum feløgunum.

# Jóannes vil halda í oyruni á bankunum

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer nú kanna um peningastovnarnir hava lækkað rentuna nóg nógv eftir at teir hava fingið almenna hjálp fyri at koma heilskapaðir ígjøgnum kreppuna. Men hann fær onki gjørt uttan at fortelja bankunum sina meining**

RENTUSTØÐIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal ein kanning setast í verk fyri at vita um bankarentan í Føroyum er ov høg.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Tí fer fíggjarmálaráðið nú undir ein kanning fyri at vita, um tær rentulækkingar, sum Tjóðbankin hevur sett í gildið, eisini eru settar í verk í Føroyum í nóg stóran mun.

Føroyar eru við í teimum báðum bjargingarpakkunum, sum danska stjórin hevur sett í verk fyri at hjálpa bankunum burtur úr altjóða búskaparkreppuni við skinninum á nøsini.

- Nú fara vit so at kanna eftir um hendan almenna hjálpin til bankarnar er komin viðskiftafólkunum til góðar í nóg stóran mun, sigur Jóannes Eidesgaard

Í samabndi við bankapakkarnar, hevur Tjóðbankin lækka rentuna nokk so fitt. Tað hava danskir peningastovnar tikið til eftirtektar og hava eisini lækka sínar rentu.

Rentan í Føroyum er eisini lækkað, men als ikki í sama mun sum tær donsku. Samstundis er innlánsrentan lækkað væl meiri enn útlánsrentan og tá í munurin á innlánsrentu og útlánsrentu økist, merkir tað, at bankarnir hava økt um vinningin.

Sjálvur ivast landsstýsismaðurin í fíggjarmálum í um føroysku peningastovnarnir hava lækkað rentuna niður á eitt hóskandi støðið eftir teimum rentulækkingum, sum hava verið rundanum okkum.

Men ætlanin er so, at hendan kanningin skal geva okkum sjón fyri søgn, leggur hann afturat.

Hann kennir væl sjónarmiðini hjá bankunum fyri, hví rentan ikki er hækkað so nóg og hví munurin á innlán- og útlánssrentu hækkar. Bankarnir siga, at tað er tí, at tað er so dýrt at vera við í hjálparpakkunum og at tað er blivið dýrari hjá teimum sjálvum at læna pening.

- Men tá ið Tjóðbankin lækkaði rentuna var tað fyri at sparka hjólini ígongd aftur og ikki fyri at bankarnir skulu brúka hetta høvi til at økja um vinningin.

- Tað er ikki nóg mikið at bankarnir fáa ágóðan av hjálparpakkunum og rentulækkingunum í kjalarvørrinum á teimum. Skulu hjólini mala aftur, er tað neyðugt, at viðskiftafólkið merkir ágóðan so at fólk fara at brúka pening aftur.

- Í øllum førum kunnu vit staðfesta, at rentan í Føroyum er ikki lækkað í eins stóran mun sum rentan hjá Tjóðbankanum og tí hevur tað týdning fyri okkum at lýsa støðuna.

- *Men skuldu tit komi til ta niðurstøðu, at rentustøðið er ov høgt, hvat fáa tit so gjørt við tað?*

- Vit fáa onki gjørt –uttan at hava eina politiska meining um tað, ásannar Jóannes Eidesgaard.

Hann staðfestir, at hann kann ikki áleggja peningastovnunum at hava eina ávísa rentu, tí tað er ein spurningur, sum peningastovnarnir avgera einsamallir.

- Men vit kunnu so í øllum førum siga okkara meining um støðuna.

Hann sigur, at hetta hevur ikki bara áhuga fyri tey einstøku viðskiftafólkini. Hetta hevur eisini stóran týdning fyri landskassan, tí landið betalir stórar upphæddir í rentustuðuli fyri lán, sum sethúsaeigarar hava.

Hann staðfestir, at har eru tað marknaðarkreftirnar sum ráða so at viðskiftafólkini brúka teir peningastovnarnir, har teir fáa besta tilboðið.

Kortini ásannar hann eisini, at tað viðskiftafólkini hava ógvuliga avmarkaðar møguleikar at velja, tí bankarnir eru fáir.

Men skulu bankarnir vera við í tí seinna bankapakkanum, ber tað so ikki til at seta teimum sum treyt, at teir halda rentuni niðri á einum ávísum støði?

- Tað kunnu vit helst ikki, ásannar Jóannes Eidesgaard.